# Dánjal Jóhan ikki so heppin sum Pætur ápostul

**Søgnin sigur, at Pætur ápostul einaferð hálaði ein gullmynt út úr kjaftinum á sankta pæturfiskinum. Svørtu blettarnir við gulari rond á fiskinum eru merkini av ávikavist tummli og fremsta fingri á Pæturi. Nú er hesin sjáldsami fiskur eisini fingin í føroyskum sjógvi!**




*Sankta pætursfiskur er ein glúpskur ránsfiskur, ið mest livir av fiskasløgum sum sardinum, sild og brislingi, men eisini av høgguslokki og ymsum krabbadýrum.*

SJÁLDSAMUR FISKUR
*Vilmund Jacobsen*

Fiskirannsóknarstovan hevur fingið sendandi ein fisk, sum er ógvuliga sjaldsamur um okkara leiðir.

- So vítt vit vita, er hetta fyrstu ferð, at hetta fiskaslagið er fingið í føroyskum sjógvi, sigur Jákup Reinert á Fiskirannsóknarstovuni.

Maðurin, sum er komin við fiskinum, er Dánjal Jóhan Lisberg úr Sumba.

Jákup heldur, at fiskurin hóskandi kundi verið nevndur sankta pætursfiskur á føroyskum, tó at hann "bara" kallast pætursfiskur í orðabókini, sum Stiðin gav út í 1998.

Tað var ísfiskatrolarin, Akraborg, sum fekk sankta pætursfiskin í trolið á Bill Baily Bankanum, 11. august 2001.

- Tíverri var fiskurin kruvdur, so vit sóu ikki, hvat hann hevði etið.

Jákup sigur, at hetta var ein kvennfiskur við hvílandi rognum, sum hann tekur til. Fiskurin var tilsamans 39 cm. langur og vigaði 910 gr.

- Vísindaliga heitið á sankta pætursfiski er zeus faber, og á øðrum tungumálum eitur hann "sankt petersfisk" (á donskum og norskum), john dory (á enskum), saint-pierre (á fronskum), pesce san pietro (á italskum), peixe-galo (á portugisiskum), pez de san pedro (á sponskum), sanktpersfisk (á svenskum) og hering-könig (á týskum), sigur fiskifrøðingurin.

Í Atlantshavinum er sankta pætursfiskur veiddur út fyri strendurnar í Afrika og Vestur Evropa, norður til Suðurnoreg og inn í Kattegat, í Miðjarðarhavinum og sunnara parti á Svartahavinum og nú eisini við Føroyar.

Jákup vísir á, at nær skyld fiskasløg eru aðrastaðni, eitt nú við Suðurafrika, Avstralia, Ný Sæland, Japan og Korea.

Sankta pætursfiskur svimur stakur ella í smáum torvum á 50-150 m. dýpi, viðhvørt fer hann niður á einar 400 m.

- Tá ið hann fer upp í sjógvin, leggur hann seg ofta á liðuna eins og flatfiskar gera, og hann er sæddur liggja á síðuni á havbotninum.

Sankta pætursfiskur er sera eyðkendur í útsjónd. Hann er hávaksin og smalur, høvdið er stórt, og kjafturin við sínum undirbiti kann skjótast langt frameftir, tá hann tekur føði. Teinarnir, serliga í ryggfjøðurini, eru langir. Liturin er ymiskur, mest blankt silvurlittur og heldur myrkari á rygginum enn á búkinum, har liturin ofta skyggir grønt.

- Eyðkendur er tann stóri svarti bletturin við gulari rond á hvørjari síðu. Tað er hesin, ið hevur givið fiskinum navn. Søgnin sigur, at Pætur ápostul einaferð hálaði ein gullmynt út úr kjaftinum á fiskinum, og blettarnir eru merkini av ávikavist tummli og fremsta fingri á Pæturi.

Jákup sigur, at flestu av hinum tungumálunum vísa eisini til sankta Pætur, og enska heitið John Dory merkir duravaktari, ið jú vísir til eina av uppgávunum hjá sankta Pæturi.

- Gýtingin fer fram við Suðurongland í juni til august og í Miðjarðarhavinum í mars til mai. Eftir gýtingina leitar fiskurin norðureftir at finna sær føði.

Fiskifrøðingurin sigur, at tá ið yngulin er 19 mm langur, líkist hann tí vaksna fiskinum.

- Vøksturin er skjótur tey fyrstu árini, og fýra ára gamal gerst sankta pætursfiskur kynsbúgvin. Kall-og kvennfiskurin eru ikki líka stórir. Fiskar, sum eru longri enn 45 cm., eru allir kvennfiskar. Teir størstu gerast meira enn 70 cm. langir.

Jákup sigur, at sankta pætursfiskur er ein glúpskur ránsfiskur, ið mest livir av fiskasløgum sum sardinum, sild og brislingi, men eisini av høgguslokki og ymsum krabbadýrum.

- Sankta pætursfiskur hevur stóran týdning sum virðismikil hjáveiða í trol- og línufiskiskapi í Miðjarðarhavinum og við vesturstondina í Afrika. Hann verður sagdur at vera sera vælsmakkandi, ja – ein hin besti yvirhøvur, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.



*Kortið vísir, hvar sankta pætursfiskur er at fáa.*

# Ætla at byggja næmingaheim á Kambsdali

**- Vit fara at brúka hetta árið til at gera tekningar og skriva umsókn til myndugleikarnar, sigur Sigurd Simonsen, býráðsformaður**



*37% av næmingunum, sum ganga í skúla á Kambsdali, kundu ynskt sær at búð á staðnum, so stytri var til og frá skúlanum. Nú ætlar Fuglafjarðar kommuna sær at gera nakað við hetta.*

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjarðar kommuna hevur sett 200.000 krónur av á fíggjarætlanini til at fyrireika bygging av næmingaheimi á Kambsdali.

Sigurd Simonsen, býráðsformaður í Fuglafirði, sigur, at stórur áhugi er millum næmingar, sum ganga á studenta-og HF-skúlanum á Kambsdali, at búgva á staðnum, har skúlin er

- Ein kanning vísir, at 37% av næmingunum á Kambsdali høvdu ynskt, at eitt næmingaheim var á staðnum, soleiðis at teir sluppu undan at ferðast í bili til og frá skúlanum.

Men býráðsformaðurin sigur, at á Kambsdali ganga so nógvir næmingar, at ógjørligt hevði verið at bygt eitt næmingaheim til 37% av øllum næmingunum.

- Vit hava hugsað okkum at bygt eitt heim við plássi til einar 40-50 næmingar, sigur Sigurd.

**Sjálvognarstovnur**

Býráðsformaðurin sigur, at Fuglafjarðar kommuna fer at arbeiða víðari við málinum, og væntandi verður greiðari, hvussu fram verður farið, tá ið komandi fíggjarætlan hjá kommununi fer í stoypiskeiðina.

- Hugsast kann, at næmingaheimið verður ein sjálvognarstovnur, sigur Sigurd Simonsen.

Hann vísir at enda á, at ætlanin hjá kommununi er at brúka hetta árið til at gera tekningar og at skriva umsókn til myndugleikarnar.



## NØVN Í VIKUNI

# Mia Pedersen formaður í Føroya Kommunufelag



*Mynd: Dimmalætting*

Mia Pedersen í Vestmanna er sett sum formaður í Føroya Kommunufelag. Mia tók við sum formaður eftir at fyrrverandi formaðurin, Jacob Vestergaard, varð settur sum landsstýrismaður. Mia hevur sitið í stýrinum í Føroya Kommunufelag fyri Vestmanna Kommunu. Mia, ið er útbúgvin sum sjúkrasystir og arbeiðir á Landssjúkrahúsinum, fer nú í farloyvi.

# Erik Mörköre

**f. 2. juni 1912 - d. 11. februar 2003**



11. februar andaðist Erik Mörköre, 90 ára gamal. Hann var føddur og uppvaksin í Klakksvík, sonur Eiðis-Johan og Christionnu.

Sum ungur var hann til skips, fekk um endan av deyðsiglaratíðini og var við dammslupp, síðan við skonnart. Mesta av ævi síni bryggjaði hann hjá Föroya Bjór. Eini 50 ár mundi tað vera íalt. Hann var við, tá ið alt var gjørt við hond, og eisini seinni tá nógv var automatiserað.

Hann gavst at arbeiða fulla tíð aftan á hann var 70, men helt fram líka til han var 80 ár, at loysa av í döguratímanum.

Honum dámdi væl at fáast við seyð og passaði hann væl. Erik var giftur við Berlinu frá Gjógv, og áttu tey 7 børn. Friður verið við minninum um Erik Mörköre.

# Fimm sveinaroyndir eftir nýggju skipanini



*Thorgrím Jacobsen frá ENM í Leirvík, Bárður Klakstein frá Autoshine í Klaksvík, Poul Arni Poulsen frá VR-Bilum í Havn, Hallur Petersen frá Reyni Service í Hoyvík og Bárður Olsen frá P/f Wenzel í Havn*

Fríggjadagin var ein samkoma á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin, har prógv vórðu handaði til teir fimm fyrstu bilmekanikararnar, sum fingu prógv eftir nýggju skipanini. Umleið 40 fólk vóru møtt til samkomuna, har røður vóru hildnar fyri nýggju sveinunum. Í gomlu skipanini var tað soleiðis, at teir sum fóru upp til sveinaroynd, fingu eina ávísa uppgávu at loysa, sum t.d. at umvæla ein motor, róðurgreiðir ella bremsur. Eftir nýggju skipanini fáa teir at vita, at nakað er galið við bilinum, sum t.d. at hann dregur til vinstru ella hann kódnar undir koyring ella annað, so skulu teir sjálvir finna brekið og rætta tað. Eisini skulu teir læra at leita egindiagnosu fram við hjálp av teldu og testara. Stórur dentur verður lagdur á tað skrivliga arbeiðið. T.d. varð funnið fram til eitt brek við stýriskipanini til air-bag í síðunum. Allir fimm stóðu seg væl í sveinaroyndini.

**m.g.**

# Bárður Klakstein fekk virðisløn frá P/F Meinhardt Arge



*Eirikur Simonsen, lærari á Tekniska Skúla, handar Bárði Klakstein virðislønina*

Sum nakað nýtt lat bilasølan, P/F Meinhardt Arge, eina virðisløn til tann sum stóð seg best í nýggju sveinaroyndini hjá bilmekanikarunum. Tað bleiv Bárður Klakstein, frá Autoshine í Klaksvík, ið fekk virðislønina fyri gott avrik til sveinaroyndina. Virðislønin var eitt Fluke mátitól, sum ein bilmekanikari illa kann vera fyri uttan. Bárður var fegin um at fáa hesa virðislønina ið Eirikur Simonsen, lærari á bildeildini á Tekniska Skúla, handaði honum. Hetta er fyrstu ferð at ein slík virðisløn verður latin til bilmekanikarar.

**m.g.**

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:.................................................................................................
Bústaður:............................................................................................
Bygd/býur:.......................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:..............................................................................

Merkisdagurin er: ..............................................................................

Innsendari: ..........................................................Tel:............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo